FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Postboks 208
110 Tórshavn

**Stjórnarskrivstovan**
12. november 2015
Mál: 15/00527-4
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 6/2015

**Fyrispurningur um grágæs, settur Høgna Hoydal, landsstýrismanni, (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

**Kári P. Højgaard, løgtingsmaður**

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa áleið, hvussu nógvar grágæs vóru í Føroyum 1. juni 2014, tá bøndur og jarðareigarar eftir umsókn fingu loyvi at skjóta burtur av stovninum alt árið?
2. Hvussu nógv loyvi eru útskrivað, hvaðan í Føroyum koma umsóknirnar, og hvussu nógvar gæs eru higartil skotnar?
3. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er rætt at skjóta grágás, tá hon reiðrast og hevur ungar?
4. Eigur slíkt loyvi ikki at verða givið í samráð við serfrøði og avvarðandi feløg?

## Svar:

### Til nr. 1.
Búnaðarstovan hevur eingi ítøkilig tøl fyri grágásastovnin í Føroyum tann 1. juni 2014. Grágásastovnurin var tó somikið stórur um tað mundið, at royndir hjá Búnaðarstovuni kundu vísa á, at grágásin gjørdi stóran skaða á velt lendi sumstaðni í landinum. Búnaðarstovan heldur tað vera spell, at grágásastovnurin ikki varð kannaður og stovnsmettur, áðrenn farið varð undir at taka burtur úr honum, soleiðis at eitt tilvísingarstøði frammanundan varð fingið til vega.

### Til nr. 2.
Tilsamans eru higartil útskrivað 26 loyvir at skjóta grágæs á veltum lendi, sí yvirlitið niðanfyri. Øll loyvini eru galdandi fram til 31. mai 2017.

Ministry of Fisheries
Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

| Yvirlit yvir latin loyvi at skjóta grágæs í 2014 og higartil í 2015, eins og fráboðaðar skotnar grágæs fyri 2014. | | | |
|---|---|---|---|
| Pláss í landinum: | Tal av útskrivaðum loyvum 2014 | Fráboðað skotnar gæs 2014: | Tal av útskrivaðum loyvum higartil í 2015 |
| Norðragøta | 1 | 7 | |
| Syðrugøta | 1 | 9 | |
| Nes | 1 | 4 | 1 |
| Skála | | | 1 |
| Skálafjørður | 1 | | |
| Kollafjørður | 2 | 0 | |
| Kaldbak | | | 1 |
| Kaldbaksbotnur | | | 2 |
| Hoyvík | 1 | 7 | |
| Tórshavn | | | 2 |
| Syðradalur S | | | 1 |
| Velbastaður | | | 1 |
| Kirkjubø | 1 | 0 | |
| Gásadalur | 1 | 2 | |
| Skopun | | | 1 |
| Sandur | 4 | 18 | |
| Hvalba | 1 | | 1 |
| Trongisvágur | 1 | 0 | |
| **Tilsamans** | **15** | **47** | **11** |

**Til nr. 3.**
Landsstýrismaðurin heldur tað ikki vera rætt at skjóta grágás, ið reiðrast og hevur ungar. Búnaðarstovan hevur havt sama sjónarmið, og hevur sett hesa áseting í tey útskrivaðu loyvini: *"3) at tað ikki er loyvt at skjóta grágæs, sum liggja á eggum ella ganga við ófloygdum ungum"*. Ásetingin er givin við heimild í reglugerð frá Fiskimálaráðnum dagfest 12. juni 2014.

**Til nr. 4.**
Burðardygg gagnnýtsla av einum náttúrutilfeingi eigur, sum meginreglu, at byggja á skikkaða vitan. Búnaðarstovan hevur formligar yrkisførleikar innan evnini villdýraveiða og villdýrarøkt (DK=jagtpleje/vildtpleje). Búnaðarstovan hevur einki ímóti at hoyra avvarðandi feløg og aðra serfrøði á økinum, men skal samstundis vísa á, at hetta ivaleyst fer at drála um avgreiðslutíðina.

**Høgni Hoydal**
*landsstýrismaður*